Nr. 1 | feb. 2014 | 67. árið

# Kirkjuligt Missiónsblað

## Sannleikanum trúgv í kærleika

**Hjartans einleiki**

Tann ytri skilnaðurin í kristna heiminum hevur verið í umleið túsund ár (ella frá ár 1054, tá tær eystur-ortodoksu kirkjurnar skiltu seg frá teimum vestur-katólsku).

Tað verður ofta sagt, at hesin skilnaður hevur havt skaðiliga ávirkan á heimsmissiónina. Tí hava kirkjuleiðarar, serliga í 1900-talinum, av álvara roynt at skapa einleika í tann kristna heimin, sambært Jesu bøn.

"[Eg biði um,] at teir allir mega vera eitt, at eins og tú, faðir, ert í mær og eg eri í tær, teir eisini mega vera í okkum, til tess at heimurin skal trúgva, at tú hevur sent meg." (Joh 17,21).

Fyrst eiga vit at staðfesta, at orðini "at teir allir mega vera eitt" ikki bert vísir til tann *ytra* einleikan. Nógv hugskot og hugsjónir kunnu føra til eina skipan við ytri einleika. Men Jesu høvuðsprestabøn peikar ikki á ein slíkan einleika. Hansara orð meina fyrst og fremst hjartans einleika. Lukas sigur í Ápostlasøguni, at *"allur flokkurin av teimum, sum tikið høvdu við trúgv, hevði eitt hjarta og eina sál" (Ápost. 4,32).*

Somuleiðis sigur Harrin í Jeremiasar bók: *"og eg gevi teimum eitt hjarta og ein veg, so at tey óttast meg allar dagar, teimum til eydnu og børnum teirra eftir tey." (Jer32,39.*

Í ljósinum av Guðs Orði skulu vit stremba eftir hjartans einleika. Tað mest umráðandi í hesum hjartans einleika er trúgvin á, at Jesus við sínum ofri hevur sónað alla heimsins synd. Uttan tað byggja vit ikki ríki hansara, men stríða ímóti tí og gerast "fíggindar av krossi Krists" (Fil. 3,18).

**Einleiki í sannleikanum**

Framvegis skal kirkjan ikki lata sær lynda við tí felags grundarlagnum, men ein og hvør eigur at síggja til, um hann byggir á grundvøllin við gulli, silvuri og dýrum steinum, ella við træ, hoyggj og hálmi (1.Kor.3,10-15).

Støðugar neyðsemjur millum ymiskar lærusannføringar føra ikki langt. Við slíkari

framferð verður sannleikin toygdur sum eitt tyggigummi, sum kann formast allar møguligar mátar. At vera eitt, er ikki at *látast,* at man er eitt. At vera eitt er altíð ein livandi veruleiki.

Tí finst eingin veruligur einleiki uttan sannleikan. Sannleikin er ikki bara ein hópur av lærusetningum. Nei, tað hoyrir eisini við at vera eitt "í Faðirinum og í Soninum". Tey kristnu *eru* eitt í Faðirinum og í Soninum. Men tey mugu ansa væl eftir, at tey við sínum syndum oyðileggja tann einleikan, sum er ímillum teirra.

At halda fram við við vilja at umbera syndini, oyðileggur tann kristna heimin, hóast alla stremban eftir at hava rætt og eiga sannleikan.

Tann sanni einleikin veksur út úr tí einkulta kristna hjartanum. Um hann í eyðmjúkari bøn leitar til Harrans miskunnsama andlit, verður hansara hjarta varðveitt móti tí vonda súrdeigginum.

Í arbeiðinum at vinna menniskju fyri Jesus, riggar tað heldur ikki at blíva samd um at lata tann partin av læruni, sum man er ósamdur um, (t.d. dópin og arvasyndina) liggja. Tí at Jesus hevur bert lovað at virka við gjøgnum tey orðini, hann sjálvur hevur talað. Hann gav lærusveinunum síni orð, og teir tóku ímóti teimum (Joh 17,8).

Teir fóru út í heimin at prædika gleðiboðskapin og læra fólkini at halda alt tað, sum hann hevði boðið teimum (Matt.28,20). Í hesum lá kraftin í teirra arbeiði og signingin.

*"Men andin sigur beinan vegin, at í komandi tíðum skulu summir falla frá trúnni og halda sær at villandi andum og lærdómum av illum andum* (1 Tim 4,1).

Fyrireika teg til villurnar í komandi tíðum við dúgliga og regluliga at lesa Bíbliuna.

Guðs Orð er tann einasta hjálpin í allari neyð.

"...halgið Krist sum Harran í hjørtum tykkara; verið altíð búnir til verju fyri hvørjum manni, sum krevur roknskap av tykkum fyri ta vón, sum er í tykkum" (1 Pæt 3,15).

Kampurin fyri tí sonnu læruni

Tolsemi er vorðið til eina dygd í kirkjuni í dag. Eingin má taka sær meinboga. Um nakar fær meinboga, so er tað ein ella annar, sum hevur borið seg illa at. Teir prestar, sum alment kritisera aðrar fyri skeiva læru ella ógudiligt lív, verða sæddir at vera orsøk til, at menniskju venda sær frá gleðiboðskapinum.

Soleiðis verður í dag javnmett at vera orsøk til meinboga og at gera onkran keddan. Men upprunaliga meinti orðið meinbogi, tá onkur vísti vánaligt fyridømi við einum djúpum fráfalli í læru og lívi. Hetta skuldi kirkjan og harumframt eisini samfelagið sláa niðurá. Á tann hátt vildi man halda virðingini fyri lóg og rætti í landinum og hindra, at rotinskapur og villa komu í.

Av og á grundar man ógvuliga fínt og kensluligt tolsemið við, at tað sýnir kærleika. At verja ta sonnu læruna verður harafturímóti sæð sum, at ein er ov víðgondur. Og sjálvandi – kampurin fyri tí røttu læruni kann við einum snævurskygdum og ov stórum ídni leiða til trist úrslit og enda í tiltøkum, sum blíva til okkara "svørðmissión".

Hóast hesar vandar kann tað tó aldri góðtakast, at man stríðir móti sannleikanum við at vísa til kærleikan. Í kærleikans navni má man aldri víkja frá opið at siga sannleikan, hóast tað vil føra til ósemju og stríð í meinigheitini, har sátan ger um seg við sínum lygnarandum og ger sjálvt íðin kristin í ørviti.

Fyri rætt at kunna rópa hetta út, læni eg orð frá Luther. Hann skrivar í eini frágreiðing til Sl. 94,1 (*Harri, hevndarinnar Guð, hevndarinnar Guð, sýn teg í dýrd!*):

"Hvussu kann Dávid biðja Guð hevna, tá ið Kristus lærir okkum at vælsigna tey, sum banna okkum? Stríðir tað ikki ímóti kærleikanum at biðja hevnd yvir tey, sum man átti at ynskt og gjørt alt gott fyri?

Vit svara: Trúgv og kærleiki eru tvey ymisk ting. Trúgv tolir einki, kærleikin tolir alt. Trúgvin bannar mótstøðumannin, kærleikin vælsignar

hann. Trúgvin søkir hevnd og straff, kærleikin søkir miskunn og fyrigeving.

Tá ið tað ræður um trúnna og Guðs Orð, skulu vit ikki longur leita eftir tolni, men yvri, vreiði og kritikki. Soleiðis gjørdu profetarnir. Annars kundi eingin staðið ímóti falskari læru, sum jú altíð verður, at man átalar hesa læruna og hennara prædikantar. Tá ið man prædikar ímóti vranglæru, skal man tvørturímóti gera alt fyri at útrudda hana, sum eisini kallast at banna í trúgv.

Áðrenn trúgvin gongur við til, at Guds orð verður útruddað og hin ranga kemur ístaðin, vildi hon latið allan skapningin gingið undir. Tí at við tí rangu læruni missa vit Guð sjálvan."

Soleiðis lærir reformatorurin. Út frá sínum egnu royndum leggur hann afturat eina aðra staðni, at tá ið ranglæran verður avdúkað, byrjar sátan at tala um kærleika. Sálarfíggindin veit nevniliga, at hann einki klárar ímóti sannleikanum.

"Tá ið talan um sannleikan ikki steðgar, men heldur á, missir hann til síðst tær sálir, sum hann hevur fangað og mishandlað. Tí roynir djevulin í síni neyð at ørkymla menniskju og tala um kærleika ístaðin fyri sannleika. Men Guð gevi, at eingin má vera fangaður í hansara fellu! Mátti sannleikin í staðin fyri verið sagdur enn klárari! Her er tað ráðið, sum eg fekk, brúkiligt: Lat okkum vera føst, men ikki hørð."

Sonn lære – satt lív?

Okkara tíð sýnist at vanvirða alla læru, sum skilir ímillum rætt og órætt, og sum fordømir órættin.

Mótmælini vilja ongan enda taka, serliga um fordømingin rakar syndina, sum nú ræður í samfelagnum og í kirkjuni og hjá tænastumonnum í høgum størvum. Umbering samfelagsins verður til intoleransu. Allur fjølmiðlaheimurin blæsur til álop.

Tala um umbering av syndum verður útbreidd á ein hátt, sum ljóðar milt, avslappandi og andaliga linkandi í oyrunum á fólki, meðan man í bakgrundini slaktar tey, sum tala sannleika.

Men tað stendur jú skrivað: *»Tín vegna verða vit dripnir allan dagin, verða mettir javnt við skurðseyð.«* (Rom 8,36).

Samtíðis má eg við trega staðfesta, at tað ikki er nokk at framhevja og prædika tað, sum er rætt. Sjálvt ikki, tá ið heimurin vendir sær ímóti okkum. Botnurin fellur út úr øllum okkara virki, um vit ikki liva, sum vit prædika.

Hvat nyttar tað at fáa onnur til at trúgva, at vit uppliva mótgongd vegna okkara sonnu læru, um trupulleikin í veruleikanum er eitt fjalt syndalív, sum vit ikki vilja viðganga? Til endans verður jú alt avdúkað. Sjálvt tann størsta sannføringin um læruna – fyri ikki at tala um tað størsta sjónleikaratalentið – kann ikki við tíðini goyma tað víðopna sárið, sum munurin millum lív og læru er.

Eg skrivi sjálvur sum ein syndari, sum hevur uppiborið at vera tveittur burtur. Vit kunnu ikki sleppa av við okkara óndskap, men tann miðvísa tøgnin um hann og útbreiðslan av hvítum lygnum og av hálvum sannleikum, hálar Guðs ræðuligu vreiði niður yvir okkum.

*"Tí at nú er tíðin komin, til at dómurin skal byrja við Guðs húsi;"*(1 Pet 4,17).

Í sannleikans navni sigi eg við meg sjálvan og onnur, at vakrir leikir í tí játtanartrúgva sjónleikarahúsinum og viðlíkahaldið av vøkrum pallmyndum millum gamalttrúgvandi ikki hevur nakað virði. Guð býtir ikki Oscar-prísir á dómadegi, men nú í náðitíðini vil hann fyrigeva okkara ófullkomnu royndum í at goyma okkara synd og ólýdni. Eg stóð helst fremst í raðnum til helviti, um eg skuldi verið dømdur eftir tí, eg havi uppiborið. Hóast tað, vil eg minna á, at tað er ein reinur og skærur býttisskapur at halda fast við ein andaligan skort, sum man veit leiðir til undirgang.

av Timo Laato
Dan Jógvan Eliassen umsetti

# Andakt

Eg hugdi og hugdi, og sí, hásæti vórðu sett fram, og ein, sum gamal var, sessaðist; klæði hans vóru hvít sum kavi og hárið á høvdi hans sum rein ull; hásæti hans var eldslogi og hjólini undir tí brennandi eldur.

Streymur av eldi floymdi úr og streymaði haðan; túsund túsunda tæntu honum, og tíggju túsund tíggju túsunda stóðu frammi fyri honum. Síðan varð rætturin skipaður, og bøkur vórðu upplatnar.

Dánjal 7,9-10

Kap. 7 hjá Dánjali er ein dramatiskur kapittul. Í einum dreymi fær profeturin fýra ræðandi djór at sjá. Hvørt teirra umboðar eitt komandi heimsríki. Tað sær út til, at ikki ber til at vinna á hesum djórum, men mitt í øllum hesum sær Dánjal eitt bil inn í himmalin. Hann sær ein kongssal, sum verður gjørdur klárur til eina rættarsak. Kongsstólar verða settir fram. Tann "sum gamal var" sessast, og tað er Harrin sjálvur- Jahve, Harrin Guð tann almáttugi.

Tá hann sessaðist, varð harradømið tikið frá djórunum (ø.11-12). Tey hvurvu úr eygum Dánjals, nú høvdu tey einki at týða í mun til hansara, sum nú var miðdepilin.

Tað stendur ikki at " tann sum gamal var" var skroypiligur. Nei, hann hevði vald, reinleika og heilagleika, sum ikki var av hesum heimi. Eldslogin kring hann

symboliserar hetta. Framman fyri hásætinum ella dómstólinum stóð ein mannfjøld, sum ikki kundi teljast. Tíggju túsund tíggju túsunda. Hetta eru tey menniskju, sum skulu fram fyri Guðs dómstól. So varð rætturin settur og bøkurnar latnar upp, men rættargongdin byrjaði ikki alt fyri eitt. Ein, sum líktist mannasyni var leiddur fram fyri tann gamla, og varð so vald og tign og ríkið givið mannasoninum.

Jesus kallaði seg menniskjasonurin, og hann læt ongan iva vera um, at tað var hann, sum skuldi døma til endans. ( Matt.25,31-32)

Vit menniskju verða mangan bangin og ovfarin av øllum, ið hendir í heiminum í dag.

Guð vil aftur í dag – hvønn dag – minna okkum á, at tað er hann, tann almáttugi, sum valdið hevur. Og dóminum er tað Jesus, frelsari okkara, sum skal standa fyri.

Hann doyði í okkara stað, og tað er bjarging okkara.

Úr bókini: "Pris Herren" eftir Asbjørn Nordgård

Sólvá Syderbø umsetti.

BRÆV

# Fællesbrev nr. 109

14.01.2014

Peter skrivar

**Tilbage igen**

Det styrtregner, majsen vokser og folk er i fuld gang med at rense for ukrudt.

Jeg er tilbage i Sumbawanga igen. Anne-Lene fik d. 12/12 lagt et nyt dræn-system, efter at der var renset op for stafylokokker. D. 18/12 blev hun udskrevet fra Rigshospitalet, og skal det næste stykke tid til forskellige tjek i Danmark, og så regner vi med, at hun kan drage mod Sumbawanga d. 5/2. Indtil da bor Anne-Lene hos sin bror i Lyngby. Da Anne-Lene blev udskrevet, boede vi på LMH, indtil jeg skulle afsted. Det er lidt som at komme hjem i LM familiens skød at komme til Hillerød, og vi takker for hyggelig og opbyggelig samvær med Hillerød-familien, selvom den fysiske familie også blev besøgt i juledagene. Og så takker vi for de julehilsener, der nåede os i Danmark og dem, der lå til os i Sumbawanga, og for al hjælp og forbøn under vejs.

**Udfordringer**

D. 5/1 gik turen til Dar over Doha. Og det er lidt af en udfordring for søvnen, når man først ankommer til Doha vid midnatstid; skal videre 2.15; får serveret varm mad, kage og kaffe hen ad firtiden og lander i Dar lidt før otte. Dagen gik med forretninger og samvær med missionærerne i Dar, og så kom taxi'en 5.15 næste morgen. Sumry-bussen brød dog sammen på vejen, så vi var i Mbeya 5-6 timer forsinket ved midnatstid. Ingen ledige busser klokken 6.00 eller 6.30, så det blev til 8.00, og det var rimeligt godt, at det ikke blev bussen 6.30, da den var brudt sammen og vi passerede den i Tunduma efter 110 km.

Tingene virker ikke, busser bryder sammen og så siger man til sig selv: 'Nu er jeg tilbage igen', selvom Sumry, vores busselskab til Sumbawanga, nok har en standard pt, der er gået ekstra gevaldigt tilbage de sidste par år. Men der var så heller ikke strøm i Sumbawanga, de første 36 timer, jeg var hjemme. Fastnetlefonen virkede ikke, og er endnu ikke repareret; internetforbindelsen – med pakkeløsning – kunne ikke etableres, da telefonselskabet, mens jeg havde været i Danmark, havde ændret koderne for køb. Det kunne de fortælle mig næste dag. Og så kunne en kollega lige fortælle mig, da jeg ankom i taxi til bibelskolen med lidt dårlig samvittighed, fordi jeg havde forsømt to undervisningsdage, at 'riget fattes penge', så semesterstart var udskudt til d. 25/1. Det fortælles blandt andet, at hvor tidligere ledere på Brødrekirkens secondary school stak af med penge, så har den nuværende ledelse forsømt at opkræve undervisningsafgift fra en del elever, og da eleverne havde betalt deres eksamenspenge,

ja, så fik de deres eksamen, selvom skolepengene ikke var betalt (ca. 40 millioner – 150.000 kr – frygtelig mange penge her). Og så er der præsterne, der ikke har fået løn en tre måneders tid, osv. osv. Og så var der lige bankens printer, der var brudt sammen, så færdiggørelsen af kvartalsregnskabet måtte udskydes en dag. Ja, jeg er virkelig tilbage igen…

**Opløftende**

Hjemme. Og så banker det på fra morgen til aften og sms'erne tikker ind og man bliver budt velkommen hjem. Og så føler man sig virkelig hjemme. Ca. 4.000.000 havde Emma og Ndambo solgt for i bogbutikken, mens jeg havde været væk, og yderligere en million (3.500kr) blev der solgt for, den første hele dag, jeg var hjemme. Soma Biblia kalenderen er bragt med fra Dar, og da vi plejer at bruge den som jule- og nytårshilsen til ansatte i kirken; nogle af dem, vi handler hos i byen, og andre, så var det blot om at komme i gang med at komme rundt. Stakkene, der lå, skulle gennemgås, og en del mennesker besøges. Og så er Abery kommet hver dag ved en sekstiden, og har afleveret 2-3 tusinde shilling. Han arbejder med at læsse og losse lastbiler, men har sat sig for, at hans gamle slidte Bibel skal skiftes ud med en ny, og der skal købes en liturgi-bog og en sangbog (Tenzi), derfor kommer han hver dag, når daglønnen er udbetalt, og aflevere r formodentlig en god portion af dagens indtjening, og så får han efterhånden, som der opsparing nok, de enkelte bøger. Det er da opløftende. Glæd jer med mig.

I ønskes et velsignet nytår i Jesu navn

Kærlig hilsen og Guds fred
Peter

**Nýggir haldarar**

Eg ynski at halda "Kirkjuligt Missiónsblað".

Navn: ______________________________

Bústaður: ______________________________

Postnr. og bygd/býur: ______________________________

Undirskrift: ______________________________

*At senda til:*
Kirkjuligt Missiónsblað, Purkugerði 7, FO-100 Tórshavn

# Tilfar

Tann 31. desember 2013 fór Dan Eliassen út starvi, sum dagligur leiðari hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum, og vilja vit takka Dan fyri tíðina hann var í starvi hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum. Dan hevur tikið sær av at gera blaðið, ið Kristian Thorleifsson fyribils fer at taka sær av.

Tilfar til blaðið kann sendast til:
kritho@kallnet.fo ella
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Purkugerði 7
100 Tórshavn

**Viðvíkjandi haldaragjaldi**

Nú vit eru byrjaði upp á eitt nýtt ár, vilja vit við hesum minna á haldaragjaldið fyri Kirkjuliga Missiónsblaðið.

Kostnaðurin fyri eitt ár er kr. 200,00.

Kontonr., ið peningurin kann flytast til eru:

Eik Banki P/f - 9181 495.337.3

BankNordik P/f - 6460 495.053.6

Suðuroyar Sparikassi - 9870 407.748.3

Sera umráðandi er, at tygum minnast til at viðmerkja navn tygara og at peningurin er fyri haldaragjald.

Vegna Kirkjuligt Missiónsblað
Kirkjuliga Missiónsfelagið

**Kalendarar**

Vit vilja við hesum takka øllum tykkum, sum hava gjørt tað stóra arbeiðið at ganga í húsini og selja kalendarar fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið. Hjartans takk.

Um onkur av okkara lesarum ikki hevur havt møguleikan at keypa kalendaran,
so ermøguleiki enn at keypa hann við at ringja til
Kristian Thorleifsson á tlf. 212856,
ella við at senda teldupost til
kritho@kallnet.fo

Kalendarin kostar kr. 80,00.

Kirkjuliga Missiónsfelagið

# Kære missionsvenner i KMF!

Guds nåde og fred være med jer i Jesu navn!

Jeg vil dele en glædelig nyhed fra Etiopien med jer. For et år siden modtog Mekane Yesus Kirken Arba Minch Parish (distrikt) kr. 20.000 fra KMF til byggeri af en lokal bibelskole. Det svarer til ca. 60.000 etiopiske birr.

I en email fra Sydvest-Synodens president, Esayas Emene, fortæller han, at bygningen af bibelskolen er gennemført med en udgift på 381.000 etiopiske birr, ca. 127,000 kr. Distriktets menigheder har indsamlet 156,000 birr, og NLM har også ydet støtte til projektet. NLM's leder i Etiopien, Tore Vågen, kom fra Addis Abeba og deltog i åbningen af bibelskolen i oktober måned. Skolen er beliggende i området ved Arba Minch University lidt uden for det centrale Arba Minch. Der er 29 elever, hvoraf 4 er kvinder, og 2 lærere på fuld tid. Eleverne går på et års bibelskole. Der mangler endnu internathuse, så eleverne må bo privat indtil videre, men menighederne i distriktet prøver at samle penge til internatbygninger også.

Hidtil har bibelskolens undervisning fundet sted i et sidelokale til Arba Minch Kirke, men det var meget ubekvemt, da lokalet også skulle bruges til gudstjenester m.m. i ugens løb. Nu er der stor glæde over egen skolebygning, og Esayas Emene udtrykker stor tak for støttebeløbet fra KMF.

Mekane Yesus Kirken i Sydvest-Synoden omfatter et vidstrakt område – jeg vil tro så stort som Danmark eller større - med over 500 menigheder og omkring 400 prædikepladser fordelt på en lang række forskellige stammefolk. Det rummer mange spændinger og en utrolig stor udfordring. Derfor må vi huske vore brødre og søstre i tak og bøn til Gud, ja, råbe til vores himmelske far om åndelig modenhed i forkyndelse, undervisning og lederskab.

"Husk på Kristus Jesus, opstået fra de døde" 2 Tim 2,8.

Med broderlig hilsen fra

Jørgen Bernhard

## "Biðið fyri arbeiðinum!"



# Gud er vónarinnar Gud

“... Gud, faðir vár, sum elskaði okkum og gav okkum ...**æviga troyst og góða vón**.” 2. Tess. 2,16.

Jesus er bæði jólanna, páskanna og hvítusunnanna Jesus. Hann er ikki bara tað óseka og vandaleysa barnið í krubbuni. Hann er Bíbliunnar Jesus við kraft, sum gevur okkum vón og frelsu.

Tað er ein grundtanki, eitt DNA, sum gongur gjøgnum alla Skriftina, og tað erhetta: Orðið skal geva vón. Viðhvørt kunnu vit missa tað stóra yvirlitið, men Gud er vónarinnar Gud og troystarinnar Gud. Boðskapurin, sum vit boða, má geva vón, møguleikar og eggjan.

Jesu orð úr Luk. 4,18 er tað sama í dag: “Andi Harrans er yvir mær, av tí at hann hevur salvað meg, til at bera fátækum gleðiboð. Sent hevur hann meg út til at boða fangum frælsi og blindum sjón, til at sleppa neyðstøddum leysum.” Tá ið evangeliið verður boðað, verður Guds kraft slept leys.

Nú skulu vit hyggja eitt sindur at bíbliufrásøgnini um hin demonsetta mannin, sum livdi millum gravirnar, og varð grøddur.

Jesus kann loysa tann mest vónleysa tilburðin. Maðurin, sum vit lesa um í Markusi 5, var bundin av 6.000 illum andum. Henda frásøgnin gevur øllum vón og vísir, at Jesus kann loysa tann mest vónleysa tilburðin.

Tá ið djevulin bindur fólk, so gongur bara niðureftir, hygg bara eftir, hvussu fólk verða bundin av alkoholi, spæliøðin og mongum øðrum.

Kjarnin í hesum er, at Jesus hoyrdi rópið frá hesum hættisliga manni hinumegin vatnið. Hann gavst við tí tænastuni, sum hann stóð mitt í, og fór yvir um vatnið at fría hann. Jesus ger seg til eitt við neyðina hjá manninum.

Okkum tørvar Bíbliunnar Jesus, sum gevur vón og frelsu. Tá ið Jesus var ávegis at loysa og bjarga hesum demonsetta manni, mátti hann hótta at náttúrukreftunum. Hann gav aldunum boð um at leggja seg.

Náttúrukreftirnar vórðu tamdar vegna henda mann og tað virðið, hann hevði í Jesu eygum. Tað einastandandi er, at Jesus er hin sami í dag.

Gunnar Jeppestøl, Effie Campbell, umsetti.

# Tað byrjaði við einari traktat



P. L. Rounds, fyrrverandi trúboðari í Japan greiðir frá:

Ein ung genta í Japan hevði verið tvey ár á einum tuberkla-sjúkrahúsi. Hon var so kløn og ússalig, at hon næstan ikki fekk flutt seg í songini.

Ein dagin, tá ið nøkur trúgvandi vitjaðu sjúkrahúsið, fekk hon eina traktat. Tann dagin var hon ov veik at halda traktatini, so hon bað sjúkrasystrina hjálpa sær, so hon fekk lisið hana.

Tá ið hon las hitt einfalda evangeliið um Jesus hevði hetta stóra ávirkan á hana. Hon bað sjúkrasystrina standa við songina, meðan hon oysti út hjarta sítt í bøn.

Hon bað um fyrigeving fyri synd sína, og hon gjørdist av sonnum umvend. Sum so mangur annar vildi henda unga gentan býta sína frelsugleði við onnur.

Ein dagin las hon um ein mann, sum var deyðadømdur fyri morð. Hon gjørdi av at skriva til hansara og siga honum frá Jesusi; men tað tók henni tríggjar dagar at skriva eitt lítið bræv liðugt. Hon sendi traktatina, sum hevði havt so stóran týdning fyri hana, saman við brævinum.

Iwata San, sum fangin æt, var at byrja við líkasælur og kaldur mótvegis brævinum; men eftir at hann hevði lisið tað og var farin at fata, hvat ið tað hevði kostað henni at senda honum hetta brævið, gjørdist hann rørdur, av tí at tað var onkur, sum hevði umsorgan fyri sál hansara. Traktatin varð lisin meira enn eina ferð, og ein dagin greip sannleikin hjarta hansara. Hann tók við boðskapinum í trúgv, og tann dagin frelsti Gud ein harðrendan drápsmann í einum av fangahúsunum í Tokyo. Vitnisburðurin hjá hesi ungu gentu hevði borið ávøkst.

Seinni varð hesin drápsmaðurin fluttur

til tað fangahúsið, har hann skuldi avrættast, umleið 600 km frá Tokyo. Ein dagin, tá ið hann sang ein av teimum kristnu sangunum, hann hevði lært, hoyrdi hann eina rødd kalla gjøgnum eina lítla sprungu úr einum øðrum kliva.

Har sat ein maður, sum kallaðist Uchida, sum eisini hevði funnið Jesus sum sín Frelsara. Hesir báðir gjørdust ógvuliga glaðir at kunna luta sína frelsugleði hvør við annan.

Iwata San og Uchita San fóru nú til verka, so hinir deyðadømdu fangarnir kundu blíva frelstir. Fangavørðurin gav teimum loyvi, meðan teir sótu og ótu, at siga hinum fangunum frá tí, teimum hevði verið fyri.

Iwata San sat í fangahúsinum í tvey ár, og ta tíðina fekk hann náði at leiða 41 aðrar fangar til Jesus. Fangavørðurin gav øllum hesum loyvi at verða doyptar í fangahúsinum, og allur dámurin í deyðsklivunum broyttist frá ótta til gleði og frið. Tá ið vaktarmenninir gingu sína rutu millum klivarnar, hoyrdu teir evangeliskar sangir úr rættiliga nógvum klivum.

Men tíðin, tá ið Iwata San skuldi avrættast, nærkaðist. Hann hevði bara eitt ynski, áðrenn hann doyði, og tað var at sleppa at vitja hesa ungu gentu, sum hevði sent honum brævið við traktatini. Hetta ynskið varð uppfylt.

Tá ið hann sat við sjúkrasongina, segði hann henni, hvat ið Gud hevði virkað í hjarta hansara gjøgnum brævið. Tá ið hon hoyrdi tað, runnu tárini stríð oman eftir kjálkum hennara.

Áðrenn hann fór avstað aftur, kendi Iwata San seg leiddan at leggja hendurnar á høvur hennara og biðja fyri henni. Síðani varð hann førdur aftur til fangahúsið, har hann varð avrættaður. Men sál hansara fór heim til Guds, sum hevði reinsað hana í Jesu blóði.

Sama megin, sum hevði umbroytt hjørtuni á fangunum, kom nú inn í lívið hjá hesi ungu gentu. Eftir tveimum vikum var hon fullkomiliga grødd, og hon kundi fara heim aftur.

Eitt sovorðið undur gjørdi Gud. Og alt byrjaði við eini traktat.

“Kirkeklokken”.

E. Campbell umsetti,

# Eyka olja

Vit eru mong, sum kunnu siga við sálmaskaldinum: “Løður várar mega fullar verða og geva av øllum sløgum...” Sálm. 144,13. Hjallar og frystiboksir eru full, so likaminum tørvar einki. Tað er eisini neyðugt, ja, álvarsliga neyðugt, at vit hvør einstakur sær til, at vit liva so, at okkara innara “løða” ella “spísikamar” støðugt er fult av Guds góðu orðum, Anda, fruktum og gávum – og eyka olju.

Í Matteusi kapittul 25 hoyra vit boðskapin um tær tíggju brúðarmoyggjarnar. Á ein hátt er tað ein frásøgn, sum eg kundi ynskt, ikki stóð í Orðinum, av tí at hon er bonsk. Fimm sluppu inn – fimm sluppu ikki inn. Men tá ið Jesus hevur valt at siga okkum hesa frásøgnina, so er tað tí, at vit sjálvandi hava brúk fyri at hoyra hana.

Allar tíggju gjørdust linar og svøvntungar; men fimm teirra høvdu í góðari tíð syrgt fyri at fáa sær ta eyka oljuna, sum gjørdist so avgerandi: Dagliga at liva við Gudi, dagliga at lesa orð hansara og liva í teimum gerningum, hann hevur lagt til okkara, dagliga at siga: “Jesus, mær tørvar teg, fyll meg við Anda tínum! Ger tað so, at mín “løða”, mítt “spískamar” fyllist, eisini við eyka olju!”

Um eg harafturímóti mest sum eri ein kristin av navni, men annars havi úr at gera og eri púra burtur í hesi verð og nógvu tilboðum og sýslum hennara, men sjálvandi fari til eitt kristiligt møti soleiðis eina ferð uppímillum fyri at halda “kristnu fasaduna pussaða”, ja, so savni eg mær ikki eyka olju.

Men dagurin kemur, tá ið ógvislig kreppa rakar, ella upp aftur verri, tá ið Jesus kemur aftur. Tá verður tað ikki tann “moyggjarliga fasadan”, sum hevur týdning, men tá er spurningurin, um eg havi eyka olju.

“Harri, eg biði teg um náði at vera ein partur av tí bólkinum, sum ikki bara hevur eina kristiliga fasadu, men sum hevur ríkiligt av olju til lívið her – og eisini nóg mikið at røkka alla leiðina heim til tín. Amen.”

Effie Campbell umsetti.

## “Biðið fyri arbeiðinum!”



# Pálmin Petur og vevarafuglarnir

Pálmin Petur var eitt stórt træ. Tað hægsta og vakrasta í øllum skóginum. Peturi dámdi væl at hyggja niður á øll hini trøini í skóginum og at rista við greinunum, so at øll hini trøini hugdu upp til hansara og vórðu hugtikin av honum.

Ein dagin kom ein flokkur av gulum og svørtum vevarafuglum og settu seg á greinarnar hjá Peturi. Petur varð sera stoltur av, at fuglarnir høvdu valt hann fram um øll hini trøini í skóginum. Hann reypaði sær av hesum og spurdi hini trøini, um hann ikki sá sera gott út við hesum vøkru fuglunum á greinunum.

Hini trøini høvdu altíð hildið, at Pálmin Petur var eitt klókt træ, men máttu sanna, at hann ikki hugsaði seg nóg væl um. Tey stóðu boygd og syrgin og hugdu niður á vøllin.

So segði eitt træ við Petur, at hann hevði rætt í, at fuglarnir vóru vakrir, men spurdi, um hann ikki visti, at teir vóru vandamiklir og kundu oyðileggja hann og hansara greinar. Øll hini trøini tóku undir við trænum og nikkaðu, men Pálmin Petur lurtaði ikki eftir teirra ávaringum og bað tey hyggja um seg sjálvi.

Fuglarnir fóru so undir at byggja sær reiður á greinunum hjá Peturi uttan at spyrja hann um loyvi. Teir sungu og prátaðu, og tað gekk skjótt at veva tey ymisku reiðrini. Petur sá, at teir boygdu hansara vøkru bløð og vevaðu tey saman til reiður. Hetta legði Petur onki í, tí hann fekk als ikki ilt.

Fuglarnir vóru sera arbeiðssamir, og allastaðni á hvørjari grein vórðu reiður at síggja. Ein dagin sá Petur, at bløðini vóru farin at gulna. Tey grønu bløðini, sum eftir vóru á greinunum, slitu fuglarnir av við sínum spísku nevum. Tá fekk Petur ilt. Hann sá eisini, at hann alt meiri sá út sum eitt lasafar, og at fuglarnir vóru í holt við at oyðileggja hann. Hann gjørdist bangin og illur, men onki hjálpti. Fuglarnir búleikaðust í trænum, sum um at teir áttu tað.

So við og við flugu ungarnir úr reiðrinum, og ein dagin vóru allir floygdir, og Petur stóð einsamallur eftir. Ikki var hann longur tað sama vakra træið, har hann stóð so nakin uttan grøn bløð, og stutt eftir doyði hann. Hini trøini stóðu eftir boygd og kedd um, at Petur Pálmi ikki var teirra millum longur.

Í sálmi 92, ørindi 13 stendur skrivað: Hin rættvísi veksur sum pálmin, sum Libanons sedristræ grør hann.

Og í sálmi 1, ørindi 1-3 stendur: Sælur er maður, ið ei fylgir vándra manna ráði, ið ei stendur á syndara vegi og ei situr í spottara lagi; **v2** men hvørs hugur stendur til Harrans lóg og yvir lóg hans grundar dag og nátt. **v3** Hann er eins og træið, plantað við áarløkir, ið aldin gevur í tøkum tíma, og hvørs leyv ei følnar; alt, ið hann ger, honum eydnast skal.

Ein kristin er sum ein pálmi – ið eigur at bera frukt. Men mong líkjast Petur Pálma. Tey lata syndarinnar vevarafuglar byggja reiður í teirra lívi. Eingin er syndafríur, men um menniskju lata syndina taka bústað í teirra lívi, førir tað til deyða. Fest tí tínar røtur á Guðs orð og lat ikki vevarafuglar festa búgv í tínum lívi.

Petra Gregersen

# BARNASÍÐAN

## Sálomon og drotningin úr Saba

Vit hava hoyrt um, at Sálomon var ein vísur og ríkur kongur. Hann var sera ungur, tá ið hann gjørdist kongur eftir pápa sín Dávid og arvaði eitt stórt og sterkt ríki. Tá hansara einasta ynski til Guðs var at fáa vísdóm til at stýra landi sínum og fólki, gjørdist Guð glaður. Av tí at Sálomon vísti seg at vera so vitugur, lovaði Guð honum umframt vísdóm eisini ríkidømi og heiður.

Sálomon gjørdist kendur víða um fyri sín vísdóm, men eisini fyri alt, sum hann fekk frá hondini. Handilslívið í landinum blomstraði undir hansara veldi, og hann var ein góður byggimeistari. Bygdi nógvar vakrar bygningar, harímillum templið. Fólk komu úr øðrum londum til Jerusalems at hoyra hann og at síggja alt tað vakra, sum hann hevði bygt.

Eisini drotningin úr ríka landinum Saba ferðaðist langa leið til Jerusalems at síggja Sálomon, sum hon hevði hoyrt so nógv um. Hon varð bilsin, tá ið hon hitti Sálomon og sá verk hansara. Hon undraðist eisini á hansara vísdóm.

Tað, at tað gekk so væl hjá Sálomoni eisini peningaliga, tí at hann hevði gott handilssamband við onnur lond, hevði eisini keðiligar avleiðingar fyri hann. Hann fekk sær nógvar konur, og mangar av teimum vóru eisini heidnar. Tær høvdu ávirkan á hann, og tá ið hann varð vorðin gamal, lokkaðu tær hann at ofra til skurðgudar.

Tá gjørdist Guð illur og segði, at ríki hansara skuldi verða skift sundur í tvey ríki, og at sonur hansara bert skuldi fáa ein part av landinum eftir hann. Alt byggivirksemi, sum Sálomon hevði staðið fyri, kostaði landinum nógv, og longu meðan Sálomon livdi, vóru fólk farin at knarra um, at hann legði ov tungar skattir á tey, og í pørtum av landinum vóru tað fólk, sum gjørdu uppreistur. Hetta var so byrjanin til, at landið eftir deyða Sálomons varð býtt sundur í tvey.

Petra Gregersen

# BARNASÍÐAN

## Hvat var Sálomon?

Setið orðini inn í orðagátuna.
Onkur av teimum eru undirstrikað í tekstinum.



Loysn




*Umbróting:*
*Brandur Petersen*

*Prent:*
*Estra*

*Ábyrgd:*
*Kristian Thorleifsson*

*Útgevari:*
*Kirkjuliga Missiónsfelagið*
*Purkugerði 7*
*FO-100 Tórshavn*
*Tlf.:212856*
*T-postur: kritho@kallnet.fo*
*Heimasíða: www.kmf.fo*
*Konta: 9181-495.337.3*

*Kirkjuligt Missiónsblað*
*kemur út 8 ferðir um árið*
*( feb, mar, mai, jun,*
*aug, sep, nov, og des)*

*Haldaragjald: kr. 200,-*